## Føroyar fremsta trygdarskjól móti fíggjarkreppuni



»Við ongum enda á verandi niðurgongd í eygsjón, verða lond kroyst eftir hæli, og teirra leiðslur tosa um fíggjarligar bjargingarpakkar. Innast inni byrja fólk at ivast, hvørt tað yvirhøvur eru nøkur støð eftir, ið kunnu veita teimum eitt trygdarskjól. Góðu tíðindini eru at, ja, tað eru tað. Vit hava neyvt útvalt seks støð, ið lutfalsliga eru uttanfyri vandaøkið. Meðan restin av heiminum gongur gjøgnum ein aldudal, bjóða hesi seks støðini ein glampa av vón«. Soleiðis skrivar heimasíðan hjá einum av fremstu vinnurásum í India, CNBC-TV18 í innleiðingini til útvalið av støðum í heiminum, ið kunnu vera trygdarskjól móti fíggjarkreppuni. Serliga áhugavert er tað, at Føroyar liggja nummar eitt á listanum. Hóast hetta tykist sum eitt herðaklapp til okkum føroyingar, eigur hetta at verða tikið við fyrivarni, og verður hugt eftir listanum, sæst hví. Á listanum eru frá eitt til seks: Føroyar, Washington D.C., USA, Larsemann Fjøllini, Antarktis, Øll ikki-Starbucks-brúkandi lond, Nagorno Karabakh (millum Aserbadjan og Armenia) og Butan

# Føroyingar kunna fáast heimaftur

**Í morgun varð triði og seinasti parturin av stóru kanningini um, hví føroyingar ikki koma aftur til Føroya úr Danmark, lagdur fram. Ítøkilig uppskot um, hvussu hetta kann gerast, eru nú løgd fram**



*Tað er Tórshavnar Kommuna, sum er høvuðsstuðul aftan fyri kanningina, og tí var framløgan náttúrliga hildin í býráðshúsinum*

KANNING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Drúgva og umfatandi kanningin um, hví føroyingar ikki koma heim aftur úr Danmark, er nú at enda komin.

Tað var Sjúrður Skaale, sum tók stig til kanningina, tá hann sat á Fólkatingi fyri Høgna Hoydal, og av tí at tað var Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi, sum stóð aftan fyri, var kanningin skjótt gjørd til eitt politiskt mál. Men tað hevur Sjúrður Skaale alla tíðina víst aftur. Tað eru nú góð tvey ár síðani, at kanningin byrjaði.

Og júst tí, at kanningin fekk politiskar undirtónar, førdi tað til atfinningar, at Tórshavnar Kommuna hevur verið høvuðsstuðulin.

Men uttan mun til hetta má roknast við, at alt politiska spektrið fær ágóðan av úrslitinum av kanningini.

### Fýra bólkar

Føroysku útisetarnir eru býttir upp í fýra bólkar, Tey Siðbundnu, Tey Grundfestu, Tey Framsøknu og Tey Heimkæru.

Fyrsti partur av kanningini var meiri ella minni reint statistiskur, meðan annar partur snúði seg um býti millum útisetarnar, bæði kyn og aldur. Triði partur snúði seg meiri um at fara í dýpdina og gera longri samrøður við føroyingar í Danmark. Finna útav, hvat skal til, fyri at teir flyta heim aftur.

Bólkarnir verða defineraðir soleiðis, at Tey Grundfestu eru tey, sum eru grundfest í Danmark og ikki fáast heim aftur uttan mun til hvat. Tey Heimkæru eru tey, sum koma heim aftur, hava tey tann minsta møguleika fyri tí. Tey Siðbundnu eru tey, sum eru sosialt illa fyri, hava onga ella óvanlig útbúgving. Tey Framsøknu eru tey, sum hava ambitiónir.

Suni Poulsen vísti á, at tað er seliga hesin seinasti bólkurin, sum besti møguleikin er at fáa heim aftur.

Hann hevði sett upp virði móti hvørjum øðrum at verða verandi í Danmark ella at flyta heim aftur til Føroya.

Tað, sum serliga dregur fólk aftur til Føroya er eitt nú tættari familju- og vinalagsbond, hetta at koma hvørjum øðrum við. Róligari lívslag, »nái eg tað ikki í dag, so nái eg tað nokk í morgin«-mentaliteturin. Lagaligari forhold til arbeiðsviðurskifti, hetta ikki at ganga so høgt upp í at halda tíðaravtalur. Nærri náttúruni. Betri uppvakstrarkor hjá børnum.



*Sjúrður Skaale, sum sat á Fólkatingi fyri Høgna Hoydal, tók stig til kanningina, sum byrjaði fyri góðum tveimum árum síðani*

### Umhugsa javnan møguleikan

Tað, sum talar fyri at verða verandi í Danmark, er millum annað betri starvsog eftirútbúgvingarmøguleikar. Størri frælsi at velja lívsstíl, ert meiri anonymur og einstaklingar kenna ikki sama trýst at finna sær maka. Fleiri og fjølbroyttari mentanartilboð, bæði tiltøk í Danmark og í sambandi við ferðir uttanlands. Góð kor hjá børnum at læra, frálíkir skúlar og nógv og fjølbroytt frítíðartilboð.

Spurningurin er so, nær føroyingar umhugsa at flyta heim aftur. Um tað finst eitt vindeyga, har føroyingar í

## Kunning í Miðlahúsinum

Í kvøld klokkan 20 fer Suni Poulsen at hava framløgu í Miðlahúsinum av triðja parti av kanningini við heitinum »Eg vil so fegin hava, at børnini læra føroyskt«. Framløgan er almenn og høvið verður at seta spurningar.